# handVERKARIN

BLAÐ NR. 53
HAVNAR HANDVERKARAFELAG





# FØROYSKIR HANDVERKARAR OG VINNUHÚSIÐ

Sambært núgaldandi skipan á útlendingaøkinum er ikki møguligt at fáa útlendingar til Føroya - við undangóðkenning - um arbeiðsloysið í Føroyum er omanfyri 6 prosent.

Hóast mangt talar fyri, at okkara skipan í løtuni er skilagóð, so frættist javnan frá Vinnuhúsinum, at tey ynskja sær eina aðra skipan. Tey ynskja sær eina føroyska skipan við einum víðopnum arbeiðsmarknaði líka mikið, hvussu støðan í samfelagnum annars er. Skipanin skal ikki avmarkast á nakran hátt.

Hetta fær okkum at hugsa um Anitu-málið, og minnir okkum samstundis á, hvuss álvarsom viðurskifti koma og fara.

Tí loyva vit okkum her at spyrja Vinnuhúsið um tey veruliga meta tað vera skilagott at bjóða øllum arbeiðsleysum kring heimin at koma til Føroya at kappast við føroyska arbeiðsmegi.

Okkara støða er greið, tí tað er snøgt sagt onki, sum talar fyri, at ein arbeiðsmarknaður uttan avmarkingar tænir nøkrum, hvørki føroyskum arbeiðsgevarum ella føroyska samfelagnum.

Her er vágin hjá øllum pørtum ov stórur, og tí er hetta ikki annað enn at spæla við eld, og at spæla við eld er altíð vandamikið.

Tí loyva vit okkum at heita á fólkini í Vinnuhúsinum um at seta seg betur inn í slík viðurskifti. Hyggið rundan um tykkum, seti tykkum inn í støðuna í okkara grannalondum. Har eru mong ræðandi dømi. Vinnuhúsið má gera sær greitt, at tey eru á vandakós, og at tað kann fáa fatalar avleiðingar fyri okkum øll, um vit ikki brúka vanligt vit og skil. Og føroyskir politikarar eiga eisini at vera á varðhaldi.

At føroyski arbeiðsmarknaðurin skal vera víðopin sum tann í ES, fær okkum at hugsa um syndarligu støðuna, sum er íkomin t.d. í Danmark. Har er støðan so mikið álvarsom, at talufrælsi er hótt, hatur er íkomið ímillum ymsar partar av fólkinum og politiska skipanin er komin í eina støðu, sum ongin hevði droymt um undan seinasta fólkatingsvali. Tað er ófatiligt at eitt land við so drúgvum demokratiskum royndum kann koma í eina so ófrættakenda støðu. Tað er so kortini tað, sum er hent.

Støðan er tann sama í Bretlandi, og eisini

## Summarfrítíðin

Í sambandi við summarfrítíðina verður ongin avgreiðsla á skrivstovu felagsins í viku 30-31-32 og 33. Tað er frá mánadegi 20. juli til og við fríggjadag 14 august 2015.

Felagið ynskir limunum og samstavsfeløgum eitt gott summar og góða summarfrítíð.

har er niðurstøðan hjá teimum flestu, at trupulleikarnir botna í víðopna arbeiðsmarknaðinum, sum hevur verið mótaorð og mantra seinastu mongu árini.

Hetta hevur verið gott latín hjá búskaparfrøðingum hóast vit í mong ár hava verið vitni til skipanir í Evropa, sum minna mest um trælahald. Og sum eitt beinleiðis úrslit hava ófrættakendar fólkarørslur tikið seg upp, rørslur sum eru vavdar upp í ótta og hatur mótvegis øðrum mentanum. Tað er onki at ynskja sær.

Slíkum hugburði eiga vit øll at taka frástøðu frá. Tí meta vit okkum at hava skyldu til at minna á hesar trupulleikar áðrenn ov seint er. Ynskja vit **ikki** eitt slíkt samfelag, so mugu vit taka í egnan barm og taka tey stig, sum eru neyðug.

Vónandi eru okkara politikarar so frægir, at teir duga at síggja vandan, og duga at lóggeva soleiðis at vit sleppa snikkaleys.

Stóri eftirspurningurin í løtuni eftir føroyskum handverkarum botnar fyrst og fremst í vánaligari planlegging og vantandi virðing fyri handaligum útbúgvingum í Føroyum. Teknisku skúlarnir hava verið niðurraðfestir í politisku skipanini í mun til játtanir til aðrar útbúgvingar. Hetta hevur verið galdandi í mong ár.

Hesir trupulleikar mugu og kunnu ikki loysast við at importera vánaliga útlendska arbeiðsmegi. Vit kunnu vísa á nógv dømi har vánaligt arbeiði hevur kostað føroyska samfelagnum dýrt.

Og tað skal ikki vera nøkur loyna, at yrkisfeløgini hjá føroyskum handverkarum eru til reiðar at taka lut í menningini av handaligum útbúgvingunum í Føroyum.

Eitt stórt vandamál, sum eisini eigur at vera nevnt er, at tað í løtuni tekur u.l. 22 ár, at vinna tað innaftur, sum ein handverkslærlingur tjenar minni í lærutíðini í mun til tann ófaklærda við arbeiðsmannaløn. Og aftaná 4 ára lærutíð í Føroyum er lønarmunurin millum ein útbúnan handverkara og ein ófaklærdan einans uml. 11%.

Ein slík støða er á ongan hátt motiverandi og haldbar fyri okkara ungdóm. Hetta er ein veruleikin, sum vit mugu fyrihalda okkum til. Tað hjálpir onki at grenja um mangul uppá lærlingar og handverkarar, tá lítil virðing er fyri handaligum útbúgvingum, og ongin planlegging er á økinum. Hinvegin uppliva vit, at okkara grannalond hava lagt til merkis, hvør dygd liggur í okkara útbúnu handverkarum. Av somu orsøk er himmalvíður munur ímillum føroyska sveinaløn og hana, sum stendur føroyskum handverkarum í boði uttanlands.




Vinnukundadeildin í Eik

Tryggja tær arbeiðsfrið

Fá tíð til tað, sum hevur týdning fyri tína fyritøku, við góðari og skjótari ráðgeving.

Sverri er vinnukundaráðgevi í Eik. Sum partur av byggivinnutoyminum hevur hann innlit í og áhuga fyri tørvinum og dagligdegnum hjá kundum sínum. Vit arbeiða eftir meginregluni um, at góð ráðgeving og skjótar svartíðir tryggja, at tín tíð og tín orka verða brúktar til títt virksemi.

www.eik.fo tel. 348000

## Í blaðnum hesa ferð:

síða

Føroyskir handverkarar og Vinnuhúsið . . . . . s. 2
Maskinsmiður og maskinmeistari . . . . . s. 5
Sjónarhornið . . . . . s. 8
Eli Brimsvík: Formansfrágreiðing fyri árið 2014 . . . . . s. 12
Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelag: Formansrøða á aðalfundi . . . . . s. 27
Samandráttur av ársfrásøgn 2014 . . . . . s. 34

**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo

# Bara lítlafingur og tummil á høgru hond



**Jóhann Pól Christiansen er føddur í 1959. Hann vaks upp á Kirkju, har hann eisini gekk fyrstu sjey árini í barnaskúla. 8. til og við 10. flokk gekk hann í skúla í Klaksvík. Tá stóð hugurin til sjógvin, og tí fór hann til skips eftir lokna skúlatíð í 10. flokki. Hann sigldi m.a. við Ternuni og Dalenni.**

## Vildi læra til maskinsmið

18 ára gamal flutti hann til Havnar at búgva hjá systur síni. Ætlanin var at royna at finna eitt læripláss, hann hevði hug at læra til maskinsmið. Og hóast hann einans hevði tveir fingrar á høgru hond so eydnaðist tað at finna læripláss; 2. november 1977 fór hann í læru hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Og 1. november 1981 var hann útlærdur maskinsmiður. Jóhann Pól greiður frá, at hann treivst væl í Havn og lærutíðin var góð, hann nevnir at hann m.a. arbeiddi saman við Arnbjørn Stephanson, Símund Sivertsen og Hagga Rein.

## Maskinmeistaralæra

Jóhann Pól hevði hug at nema sær meira kunnleika, og hetta gjørdi, at hann søkti um upptøku á Maskinmeistaraskúlanum, sum nú hevur fingið felagsheitið Vinnuháskúlin. Tá hann stóð við maskinmeistaraprógvi í hondini hevði hann búð í Havn í 7 ár. Hesi árini høvdu verið so mikið góð, at hann hevði hug at vinna sær størri kunnleika. Tí flutti hann til Danmarkar har hann tók víðkað maskinmeistaraprógv í 1987.

Nú leitaði hugurin til sjógvin, og hann hevur verið trúgvur; seinastu 25 árini hevur hann verið maskinstjóri umborð á Ennibergi.

Í dag er Jóhann Pól familjumaður, hann býr saman við konu og børnum í Hoyvík.

## Tómlig hond

Tey, sum hava tikið í høgru hond á Jóhann Póli, merkja beinan vegin, at hondin er ikki sum hjá fólkum flest. Hon virkar tómlig og øðrvísi at taka í. Kortini skammast hann ikki við at rætta hondina fram, tá heilsast skal. Tey, sum síggja hann arbeiða, leggja skjótt til merkis, at hondin er ikki „vanlig“. Tá hendir sum oftast eitt av tveimum: Annaðhvørt ynskja hesi fólk at hyggja ordiliga at hondini



og spyrja, hví hon sær soleiðis út, ella hyggja tey burtur og aftra seg bæði við at hyggja og spyrja.

## Dagsins hending

Jóhann Pól varð føddur við tveimum vanligum hondum. Men á heystið í 1964 hendi eitt álvarsamt óhapp, sum broytti hond og lív hansara. Sum mongum kunnugt, so er ein rennistrongur á Kirkju, sum gongur frá bakkanum og oman í fjøruna, har gamla lendingin er.

Rennistrongurin varð nógv nýttur, tá postbáturin kom við vøru. Tann tunga vøran, so sum kol, sementsekkir, byggitilfar og annað, varð lagt upp í ein kassa, sum hekk í rennistronginum, og sum so varð hivaður niðan í bakkan við einum spæli.

Minniliga dagin var „postbáturin“, sum tá kallaðist Másin komin. Menn vóru í holt við at hiva vøru niðan á bakkan. Tað var „dagsins“ hending, tá Másin legði at á Kirkju.

## Vandamikið spæl

Jóhann Pól, sum tá var fimm ára gamal, var als ikki ókendur við bakkan, helluna og rennistrongin. Hann stóð uppi á bakkanum og hugdi at veirinum, sum rann gjøgnum blokkin. So tók hann í veirin umleið ein metur frá blokkinum og slepti ikki, fyrr enn hondin nærum nært við blokkin. Hetta „spældi“ hann sær við nakrar ferðir. Tað var óivað spennandi fyri ein smádrong. Men so hendi tað, sum ikki mátti henda.

„Eg veit ikki rættuliga hvat hendi. Kanska havi eg hugt burtur ella gloymt vandan við at halda í veirin. Áðrenn eg reiðuliga visti av, var hondin føst í blokkinum. Tá eg tók hana aftur til mín, vóru bara tveir fingrar eftir á henni. Harumframt var fremsta petti á lítlafingri eisini burtur“ greiðir Jóhann Pól frá.

## Bløddi illa

„Eg bløddi rættiliga illa, men kendi ikki pínu

beinan vegin. Eg havi óivað grátið ella rópt, so fólkið, har var, hoyrdu at okkurt álvarsamt var hent.

Mammubeiggi mín kom rennandi til mín, tók um hondina fyri at steðga bløðingini og bar meg niðan til húsa. Bundið varð um hondina og ringt varð eftir doktarabátinum, Medikus, sum lá í Klaksvík.

Eg lá á Klaksvíkar Sjúkrahúsið í fleiri vikur", sigur Jóhan Pól.

Eingin verja var sett upp við blokkin eftir óhappið, men menninir, sum arbeiddu við spælinum, vóru meiri ansnir, serliga tá børn vóru nærhendis.

## Ikki darvað nógv

Jóhan Pól hevur ikki hugsað nógv um minstu fingrarnar. Hann var bara fimm ára gamal, tá óhappið hendi, og minnist tí lítið og einki frá tíðini við fimm fingrum á høgru hond. Afturkomin til Kirkju aftaná óhappið, vildu fólk sleppa at síggja hondina, sum tá manglaði tríggjar fingrar. Hann metir ikki, at mistu fingrarnir hava darvað honum. Hóast hann ikki er lámur, gekk tað væl at skriva og arbeiða ymiskt við vinstru hond. Hann heldur hamara, skrúvublaði og øðrum amboðum í vinstru hond. Men skal hann brúka knív, telgja ella skera flak, brúkar hann høgru hond.

## Rætt fokus

„Eg hugsaði frá barni av, at eg skuldi klára meg líka væl sum hini. Eg hevði fokus á alt tað, eg kundi og ikki á tað, eg ikki kundi. Eg eri handverkari, hóast høgra hond bara hevur tummulin og lítlafingur.

Hondin er ikki eitt „handikapp", men hon avmarkar meg til dømis at spæla á ljóðføri" sigur Jóhan Pól.

So leggur hann afturat: „Eg klári alt maskinarbeiði umborð á Ennibergi. Einaferð breyt eg lítlafingur. Tað var ringt at ganga við brotnum lítlafingri, tí tá kundi eg ikki nýta hondina. Annars havi eg jú tvær hendur og heilar sjey fingrar. Í „mínari verð" havi eg altíð bara havt tveir fingrar á høgru hond. Tað havi eg lært meg at liva við og arbeiða við – eisini umborð á Ennibergi" sigur Jóhan Pól.

## Altíð ábyrgd

Umborð á Ennibergi eru fýra maskinmenn. Tveir eru á vakt í senn. Teir arbeiða í 12 tímar og hava so frí í 12 tímar. Jóhan Pól er á vakt frá kl. 12 til 24. Harumframt er ein „Baadermaður", sum er ein maskinsmiður, ið hevur viðlíkahaldsarbeiði av flakamaskinunum, flutningsbondum og aðrari útgerð á verksmiðjuni. Hann arbeiðir eisini í 12 tímar og hevur so frí í 12 tímar.

„Mín vakt er 12 tímar, ja, men samstundis havi eg ábyrgd allar 24 tímarnar í samdøgrinum.

Er okkurt serligt á vási, verður ikki spurt, hvat klokkan er" sigur Jóhan Pól, fryntligi maskinstjórin umborð á Ennibergi.

# SJÓNARHORNIÐ: EYÐFINN HANSEN



*Eyðfinn Hansen, stjóri á Rørtænastuni*

**Núverandi starv:**
Stjóri á Rørtænastuni.

**Aldur:** 42 ár.

**Maki:** Sólja í Dali

**Børn:**
Djóni 11 ár, Fríði 6 ár, Sára 2 ár og eitt bonusbarn Natali 9 ár.

**Handverkara útbúgving:**
Rørsmiður.

**Læra byrjað:** 1992.

**Tekniski skúli:** Í Tórshavn.

**Útlærdur:** 14. feb. 1996.

**Sveinastykki:**
Rørsveisingar, bæði jarn, kopar o.a.

**Arbeitt sum sveinur hjá:**
Sp/f Hans Dam, 6 ár, og Sp/f Rørtænastan, 13 ár higartil.

**Nær byrjaði tú sum sjálvstøðugur handverkari:**
Eg byrjaði í februar 2002, tá eg stovnaði fa. Rørtænastan.

**Hvat var tað sum gjørdi, at tú fór undir egið virki:**
Eg føldi, at eg hevði brúk fyri nýggjum avbjóðingum.

**Hvat gjørdi tú fyri at fáa nóg mikið av kundum:**
Tað var ikki neyðugt at gera tað stóra fyri at fáa kundar. Av tí at vit vóru so fáir rørsmiðir og nógv var at gera, komu arbeiðini mest sum rablandi inn :) Eg royndi tó altíð at hava vælnøgdar kundar fyri at fáa gott umdømi.

**Hvussu nógvar handverkarar hevur tú í arbeiði:**
3-4 rørleggjarar.

**Hvussu nógvar lærlingar hevur tú í fyritøkuni:**
Eg havi ein lærling í arbeiði.

**Frítíðarítriv:**
Konan sigur, at eg passi sjónvarpið í so væl :) nei, mær dámar væl at putlast við ymiskar umvælingar av húsunum. Í summar eri eg farin í holt við at skifta vindeygu, isolera og klæða húsini. Eisini skal takið á frítíðarhúsinum úti í Svínoy skiftast.

**Besta bók:**
Nú havi eg ikki lisið so nógvar bøkur, men ein tann besta eg kann minnast er bókin ”Danser med ulve”.

**Besti sangur:**
Mín besti sangur má nokk vera ”Allways Somewhere” hjá Scorpions. Hesin minnir meg á nógvar góðar løtur :)

**Besti Filmur:**
Hmm tað er ringt at siga... Mær dámar væl action, so eg vil nokk siga, at tað er ”Braveheart”.

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:**
Ja, tað var 11. september 2001, tá ið eg hevði fryst tvey rør av í niðastu hædd í LS bygninginum. Tá frætti eg hvat var hent í USA. Tá fekk eg kuldasjálvta ...

**Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um:**
Tað dugi eg ikki at siga. Um eg nevni eitt navn er lætt at skuffa aðrar, so best man vera at einki siga :)

**Besti sjónleikari:**
Har eru nógvir góðir. Eg kann m.a. nevna Bruce Willis, Julia Roberts, Kevin Spacey, Samuel L. Jackson og nógvir aðrir.

**Hvør heldur tú hevur myndað tín persón mest:**
Mamma mín, sum andaðist í fjør, hevur havt nógv at siga fyri mín persón. Og pápi mín eisini.

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:**
Nei, eingin, sum eg hefti meg serliga til.

**Hvør er tín størsta fyrimynd:**
Tað má vera abbi mín Johan M. Jacobsen.

**Fartelefon:** Iphone 6

**Telda:** Apple og Dell

**Bilur:**
Honda CRV 2.2 diesel 4x4.

**Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Eftirlønin er góð.

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Hon er fín.

**Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:**
At gera kundarnar nøgdar, tvs finna tí røttu samansetingina av góðsku og arbeiðstíð, so arbeiðið gerst gott og bíligt.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Tá man hevur fingið nógv burturúr degnum og nøgdar kundar.

**Hvat kann øsa teg:**
Hesin spurningurin hevur tikið longst tíð at svara... at brúka tíð uppá óneyðug ting :)










Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

*Upplatingartíðir :*
mána, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
**www.gassola.fo**

aquatherm BAXI ROYAL SCANDINAVIAN VØLUND VARMETEKNIK

**DEMICH P/F**
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn
Tel 200 300
Fax 200 301
demich@demich.fo

# HVS-VEITARIN TIL VINNUNA




HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ

**Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345**

## Tí velja handverkarar Demich

- Vit veita bestu ráðgevingina
- Vit umboða dygdarvørur
- Vit hava kappingarførar prísir
- Vit hava góða kundatænastu
- Vit hava døgntænastu
- Vit hava framkomnar blikksmiðju

*(Har vit kunnu tilevna inndekningar upp til 3 m)*



demich
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet

Okkara dygd – tín trygd!

www.demich.fo

www.grafikmaster.fo

# ELI BRIMSVÍK: FRÁGREIÐING FORMAN

**Aðalfundurin felagsins, sum var 29. apríl 2015 var aðalfundur nr. 65 hjá Havnar Handverkarafelag. Lat meg fyrst nevna at síðani seinasta aðalfund eru felagshús okkara umvælt og dagførd á allan hátt. Vit valdu at nýta sølupeningin fyri húsini í Sjúrðargøtu og nakað afturat til umbygging av ognini í Stoffalág. Tað er onki at ivast í at arbeiði er væl úr hondum greitt, og tað eiga handverkararnir rós fyri. Vit hava nú fingið eini felagshús, sum uppfylla krøvini langt fram í tíðina.**


*Eli Brimsvík talar*

## Lønarsamráðingarnar

Seinastu lønarsamráðingar vóru í oktober 2014. Ymiskar eru meiningarnar um, hvussu vignaðist, men vit valdu at gera ein sáttmála fyri 1 ár og 7 mánaðir við sama lønarkarmi, sum hini feløgini høvdu fingið. Sáttmálin gongur út longu 1. mai 2016. mótkravið frá arbeiðsgevarunum var, at vit í so fall komu ásamt við við hini fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum, um eitt felags samráðingartoymi. Tað meta vit avgjørt at vera ein fyrimunur. Hetta hevur verið eitt av krøvunum hjá okkum fleiri ferðir áður, men tað hevur ikki vunnið frama.

Nú hava vit loksins fingið hetta við í eina avtalu, at so aðrir, ið fyrr hava talað ímóti nú taka sær heiðurin fyri, at tað hevur eydnast at flyta samráðingartíðspunktið er eitt sindur margháttligt, men gott tað sama, aðalmálið má altíð vera, at vit skula røkka málinum.

Tað sum í hesum sambandi er eftir at gera er at lúka nakrar treytir, tað er m.a. at vit innan 1. januar 2016 hava gjørt avtalu við hini fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum um samráðingarnevndina. Henda samráðingarnevndin skal bert samráðast um sjálvan lønarkarmin, alt annað koma feløgini framvegis at samráðast um sjálvi.



Í samráðingunum vóru 4 samráðingarumfør, men longu aftaná fjórða umfar, tann 14. oktober 2015, var boð sent eftir semingsstovninum. Fyrsti semingsfundurin, var á Hotel Føroyum tann 28. oktober 2015. Eftir tað vóru nakrir fundir hildnir, har semingsmenn gingu millum partarnar, og sum so eisini endaði við einari semju.

## Krøv

Eitt av okkara krøvum undir sáttmálasamráðingunum var, at sáttmálin skuldi ganga út 1. mai 2016. Tað hevur hann ikki verið síðani 1993, og tí hava vit als onga ávirkan havt á lønarkarmin. Tað eru arbeiðarafeløgini, sum leggja karmin, tí tey eru altíð fyrst til samráðingarborðið. Tað var helst eisini meiningin, tá tað bleiv broytt í 1993, at so skuldi verað. Skipanin við, at arbeiðarafeløgini koma 1. mai og handverkarar 1. oktober passar helst arbeiðsgevarunum sera væl. Við at hava ymisk tíðspunkt fyri nær sáttmálar ganga út, verður ongantíð vandi fyri einum aðalverkfalli. Er tað nøktandi fyri fakfelagsrørsluna? Eg haldi ikki. Harvið er ikki sagt, at vit vilja sleppa í verkfall. Men um tað gerst neyðugt, og tað kann henda, so var nógv størri vekt aftanfyri um øll feløgini eru við.

## Hotel & gistingarhús

Undir samráðingunum settu vit eisini krav um, at sáttmáli okkara skuldi vera galdandi á hotel- og gistingarhúsum. Vit hava umsett partar av danska sáttmálanum fyri øki til føroyskt; so tað er bara at fara í gongd. Men tað hevur víst seg , at vera trekt at fáa Vinnuhúsið at spæla við og tað er spell. Tað átti at verið betur fyri allar partar at fingið skipaði viðurskifti eisini á hesum øki. Men nú er so niðurfelt í sáttmálan, at tað skal farast undir at skipa hetta økið, skipað eins og øll onnur; vónandi fer hetta ikki at taka drúgva tíð.

## Frálandasáttmáli

Eitt av okkara krøvum til sáttmálasamráðingarnar var, at sáttmáli verður gjørdur fyri frálandavinnuna. Tað líkist ongum, at okkara handverkarar, arbeiða umborð á oljuboripallum í føroyskum sjóøki, og firðum til vanliga

løn, meðan onnur arbeiðsøki og bólkar fáa einar 3 til 4 ferð so nógv í mun til vanliga løn. Tað er eisini at undirgrava tað samstarvið, ið vit hava við útlendsk feløg. Sum dømi kann eg nevna Noreg; um okkara handverkarar, sum starvast í Noregi. Vit hava eisini tikið stig til, at umseta norska frálandasáttmálan til føroyskt og latið Vinnuhúsinum hann.



## KOB

Vit hava eisini arbeitt við at fáa eina seravtalu við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KOB) um handverkarar á Kommunalu Brennistøðini. Tað hevur tikið rættuliga langa tíð at fáa uppá pláss, men nú er so komin ein loysn, sum menn kunna góðtaka og er til at liva við.

## Ráðstevna

Í 2015 fingu vit innbjóðing til at luttaka á olju/gaskonferansu hjá El & It Forbundinum í Bergen; tað var í viku 38. Vit vóru 2, sum umboðaðu felagið har; ein góð og viðkomandi ráðstevna.

## Fyritøkur og húsagangur

2015 var eitt rímiliga friðarligt ár – fakfelagsmessiga. Men eitt, sum er afturvendandi er hetta, at arbeiðsgevarar ikki rinda tað teir skula. Alt ov ofta hendir tað, at limir koma til okkum við áheitan um at krevja arbeiðsgevaran eftir manglandi eftirløn. Nakrir arbeiðsgevarar hava fingið geniala hugskotið bert, at rinda tað lógarásetta eftirlønargjaldið, sum í løtuni er 2%. Nakrir eru enntá so kreativir, at teir taka hesi prosenti av lønini í staðin fyri at leggja tað afturat. Hetta er sjálvsagt ikki í lagi. Hesir arbeiðsgevarar snýta beinleiðis síni starvsfólk fyri løn, tí eftirløn er partur av lønini. Og var eingin eftirløn, var tímalønin tað hægri á teimum økjum har sáttmálar eru galdandi. Tað eru sjálvandi tey sáttmálavunnu eftirlønarprosentini, sum eru galdandi, og einki annað. Tað hendir ikki so sjáldan, at feløg fara í likvitasjón. Tá er ofta ringt at fáa nakað; tí ofta er skuldin og panturin hjá peningastovni so stór, at einki er eftir. Man kann



*Fundarluttakarar á aðalfundi felagsins 26. mars 2014.05.14.*

royna Trygdargrunnin, men ikki øll krøv verða góðkend. Tað ringasta ein kann gera, um arbeiðsgevarin ikki rindar tað hann skal, er at halda seg passivan. Kemur eitt krav til dómstólin um t.d. manglandi eftirløn, og handverkari ikki leypandi hevur gjørt vart við hetta hjá arbeiðsgevaranum, verður eitt slíkt krav, sum oftast avvíst. Tí er tað sera umráðandi at gera vart við seg, tá slíkt hendur. Eitt sum er minst líka umráðandi er, at handverkarin krevur av arbeiðsgevaranum, at fáa lønarseðlar og setanarskriv. Hetta er ein lógartryggjaður rættur, og prógv fyri, at handverkari veruliga fær tað hann eigur.

## Lærlingar

Eftir hvat skilst komu onkrir lærlingar heldur keðiliga fyri, tá eitt virki herfyri fór á húsagang. Teir vóru meir ella minni sleptir uppá fjall, tí felagið onga ábyrgd hevði av starvsfólkunum eftir, at húsagangur var veruleiki, heldur ikki lærlingunum. Sveinarnir komu,





eftir hvat skilst, allir í onnur størv. Tað er harmiligt, at slíkt kann henda.

## Marknagilsdepilin

Arbeiðið við Marknagilsdeplinum er í fullari gongd, og enn verður sagt, at tíðarætlanin heldur. Vónandi verður tað so, sjálvt um onkrir feilir hava verið í bygginingini. Ætlanin er eisini, at ein depil skal byggjast á Kamsdali, sum verður fyri norðurøkið.

## Útlendingar

Eitt sum vit eisini hava arbeitt við eru rættindi hjá útlendingum, sum starvast í Føroyum. Hesir útlendingar rinda skatt, og øll sosial gjøld til føroyska samfelagið, men fáa ikki somu rættindi, sum aðrir føroyingar. Enn er ikki komi á mál hesum viðvíkjandi, men vit arbeiða framvegis málrætta fyri at fáa loyst hetta. Tó er eitt fyribils svar komið frá landsstýriskvinnuni í almannamálum. Í svarinum framgongur, at málið hevur verið fyri á landsstýrisfundi, men at undirtøka var ikki fyri at gera broytingar. Sostatt kann staðfestast, at man framvegis meinar, at útlendingar skula verða við til at rinda til landshúsarhaldið,





men eingi rættini hava. Hetta eru somu politikarar, sum hava róð upp undir, at vit áttu at tikið flóttafólk til Føroya, man gloymir nokk við vilja at nevna, at hetta í „gásareygum“ hevur ein kostnað við sær fyri føroyska samfelagið. Politiskt sær ikki út til, at man er sinnaður at rinda tann prísin, men bert brúka hetta sum valpropaganda.

Vit ætla so ikki at sleppa málinum, men arbeiða miðvíst fyri at finna eina loysn.

## Handverkarar uttanlands

Eitt sum ørkymlar er hesin afturvendandi påstandurin um at handverkarar, sum starvast uttanlands ikki rinda skatt her. Eg haldi ikki, at tað er rætt at lasta handverkaran fyri tað. Handverkarin ger bert sum lógin ásetur, at hann skal.

Ein kann so eisini spyrja, hvussu Als hevði havt tað um allir hesir 400 til 500 handverkararnir komu heim til Føroyar í senn. Hvar skuldu hesir starvast? Neyvan var, ella er arbeiði til allar hesar. Lat okkum heldur gleðast um møguleikan hjá okkara handverkarum, at starvast uttanlands og harvið økja um sínar førleikar, landi og fólki at gagni. At teir



so samstundis tjena góðar pengar er bert eitt pluss, og eigur at verða teimum væl unt.

## Tryggingarveitarin

Vit hava havt onkrar fundir við veitara, sum ynskir meiri samstarv við okkum um m.a. Eftirlønargrunnin. Vit meta at fyrimunirnir eru fleiri við ikki at taka av hesum, m.a. má roknast við, at vit um vit tóku av, koma at missa meira og meira ávirkan á grunnin sum tíðin gongur, og tað er als ikki nakað, vit kunna taka undir við. Vit hava tí tikið avgerð, um at takka nei til veitaran, og heldur sjálvir investera í nýggja limaskipan, sum tryggjar okkum langt fram í tíðina.

## Ójøvn kapping

Bank Nordik er komin inn á eftirlønarplattin og við hesum er meiri kapping komin á økið og er tað gott. Bert spell at ein so stórur aktørur ikki aftrar seg við at koma við villleiðandi lýsingum fyri at koma sær fram. Lýst verður við, at teir hava null kr. í umsiting av eftirlønum. Hetta er sjálvandi ikki so. Vit vita, at onki er kostnaðarleyst, og als ikki hjá bankunum, so tað merkir, at um null kr. er í umsiting av hesum eftirlønum er gjaldi lagt aðrastaðni, og tá tað ikki verður upplýst er hetta skeiv marknaðarføring. Bara tað, at hava eina konto í bankanum skulu øll gjalda fyri. Eftir teimum upplýsingum vit hava, er umsitingarkostnaðurin hjá veitaranum teir fóru í samstarv við fyri ár 2013 u.l. 4 %. So tað er lítið sannlíkt at Bank Nordik fær tað uttan kostna, og tað óansæð hvønn samstarvspartnara hann skuldi valt.

## Tekniski skúli

Tekniski skúli kundi herfyri hátíðarhalda sín 80 ára stovningardag. Onkur av røðarunum helt fyri, at hetta nokk var seinasti føðingardagurin hjá skúlanum; av tí at hann nú verður partur av Marknagilsdeplinum, og tí fer í søguna.

Henda útsøgn kann væl misskiljast. Tekniski skúli heldir ikki fram sum sjálvstøðugur skúli, nú hann verður partur av deplinum, men eg vóni, at hann framhaldandi kemur at framstanda sum ein góður skúli, og eitt fenskt tilboð til okkara fríska ungdóm, sum ynskir at útbúgva seg innan handverksvinnuna, og ikki hvørvur millum hinar gymnasialu skúlarnar í

deplinum; tí tað kemur altíð at vera brúk fyri handverkarum, og harvið handverksútbúgvingum.

## Fasti gerðarrættur

Eitt mál hevur nú fingið ein enda í fasta gerðarrætti. Tað var eitt mál um manglandi eftirlønargjald av tímaløn hjá handverkara, sum var fyribils settur eftir sáttmálanum við Fíggjarmálaráðið. Pástandurin hjá Fíggjarmálaráðnum var, at hesin ikki hevði krav uppá eftirløn, tí hesin var tímaløntur og, at eingin sáttmáli er millum partarnar um tímaløn, men bert ein fastlønarsáttmáli.

Í hesum føri hevði Fíggjarmálaráðið bert brúkt lønartalvuna í fastlønarsáttmálanum sum grundarlag fyri lønini. Okkara pástandur var, at eftirløn eigur at gjaldast av lønini tí, at man ikki kann taka bert tímalønarsatsin burturúr. Lønartalvan inniheldur eisini áseting um eftirlønargjald o.a. Og at hesin var settur eftir skeivum treytum. Men av onkrari óskiljandi grund fekk Fíggjarmálaráðið viðhald í kravinum, og sostatt taptu vit málið. Vit meta, at hetta var ein sera løgin avgerð hjá gerðarrættinum, tí er tað okkara áskoðan, at fakfeløgini eiga at umhugsa støðuna við fasta gerðarrætti, tí tað vísir seg ferð eftir ferð, at tað almenna vinnur sakirnar har. Fingu vit viðhald í nevnda máli, so hevði tað merkt, at



nógvar milliónir skuldu úr landskassanum til fleiri onnur fakfeløg, og tað boðaði umboðið fyri Fíggjarmálaráðið eisini rættinum frá, og tí er okkara hugsan, at henda útsøgnin kann hava verið viðvirkandi til, at vit ikki fingu viðhald.

Eitt annað er, at gerðarrætturin heldur ikki arbeiðir nakað skjótari enn sivilrætturin, tá tað eru fakfeløg, sum leggja eina ósemju fyri hann. Øðrvísi er, tá arbeiðsgevarar leggja eitt mál fyri. Tá tekur tað í fleiri førum bert nakrar fáar dagar til ein niðurstøða fyriliggur. Kostnaðarliga er heldur ikki tann stóri munurin, so tað er kanska eisini ein grund til, at umhugsa støðuna við fasta gerðarrætti.

## Lønarsamráðingar

Fyri at taka afturíaftur tað eg segði um lønarsamráðingarnar, so er tað okkara vón, at tað fer at eydnast at fáa eina avtalu við fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum soleiðis, at samráðingarnar verða í góðari tíð, áðrenn 1. januar 2016.

Nógvir snávingarsteinar eru á vegnum.

At enda fari eg, at takka okkara dugnaligu starvsfólkum fyri gott og væl úr hondum greitt arbeiði. Teirra innsatsur er ómetaliga týdningarmikil fyri felagið, og eigur als ikki at undirmetast.







»Framtíðin er tryggjað«
Ein trygg framtíð við Lív
Hjá Lív gert tú eitt trygt innskot í tína framtíð. Hetta er tí, at hjá okkum er tað styrkin í felagsskapinum, ið gevur tær møguleikar og fitt av peningi um hendi, tá ið tú røkkur eftirlønaraldri.
Sum kundi hjá Lív ert tú í tryggum hondum. Vit geva tær eina dygdargóða og skilagóða ráðgeving, sum tekur støði í júst tínum tørvi.
www.liv.fo
Innlit í útlit
SENDISTOVAN

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV










## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vegaog havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo



# 2X3

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN



**AMBOÐ ARBEIÐSKLÆÐIR**

**TILFAR BESLØG MASKINUR**

*Júst tá tú stendur og manglar tað*

# Húsavarðartænastan

Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@hvt.fo | Tel. 29 00 29



# OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.











## Reinsa við turr-ísi

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing. Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.



## Betong-saging

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm. Ring og hoyr nærri.







*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...*




SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika



Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av lágorkutermorútum, u-virði niður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466

rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

www.mest.fo
TÆNASTA KRING ALT LANDIÐ
FILTUR
HYDRAULIKKUR
EL-VØRUR
Vitja sølubúðir okkara í Runavík (tel. 301190), Havn (tel. 301100) og á Skála (tel. 301178)
MEST
– álítandi loysnir

# SOFUS JOENSEN:



## FORMANSFRÁGREIÐING Í EFTIRLØNARGRUNNINUM 2015

**Inngjøldini í Eftirlønargrunnin í 2014 vóru tilsamans 27.558 mió. kr. í mun til 22.558 mió. kr. í 2013. Tað er ein øking í inngjøldum uppá 22%. Lat meg eisini nevna, at áðrenn pensjónin bleiv skattað við inngjald, ella sagt á ein annan hátt, áðrenn Jørgen fór avstað við 40% av inngjøldunum. Tí var eisini besta árið 2011; tá blivu goldnar góðar 30 m. kr. inn, so man kann væl siga, at vøksturin hevur verið stórur seinastu árini.**

### Eftirlønarútgjaldingar

Grunnurin hevur í 2014 goldið tilsamans 3,685 m.kr. í veitingum í mun til 2,874 m.kr. árið fyri. Serliga eru útgjaldingar við pensionering hægri í 2014 enn í 2013. Hetta vistu vit av.

### Íløgur

Nevndin í eftirlønargrunninum hjá Handverkarafelagnum hevur altíð haft fyri eyga at vera sera varin við íløgunum. Tí sum ein serfrøðingar á økinum segði: jú størri váða tú tekur á teg – jú størri er vinningurin, men ein sannroynd er eisini, at vandin fyri at missa pening er størri.

Reglugerðin hjá grunninum, sum vit hava at halda okkum til, sigur, at vit skulu fáa sum mest fyri peningin hjá limunum, so tað er upp til nevndina at taka støðu í hvørjum einstøkum føri. Havandi í huga, at tað hvørki er nevndin ella grunnurin, ið eiga peningin, men at hann er ogn hjá øllum teimum, ið hava goldið inn, og at hann má vera tøkur, tá vit skulu hava hann goldnan útaftur, so kunnu vit ikki taka ov stóran váða á okkum. Tí má hvør einasta avgerð altíð vera væl umhugsað.

Eg kann við einum ávísum stoltleika siga, at tað hava vit livað upp til.

Eitt annað kunnu vit eisini vera stolt av, og tað er, at hóast vit øll, ið sita í nevndini í grunninum „bert“ eru handverkarar, og í eygunum á nógvum vælútbúnum „bert“ hava eina vánaliga skúlagongd, so hava vit ongantíð mist nakran pening. Tað hava onnur gjørt í stórum stíli, og hetta hóast tey hava gingið í góðum og dýrum skúlum. Vit passa sera væl upp á okkara pening.

### Avkast

Sum onkur tykkara veit, so hava vit valt at tikið við tilráðing frá okkara aktuari um bert at útluta 2% í rentu í ár, vælvitandi um, at tað ikki er nógv.



Um hugt verður at undanfarnum árum, so kann man kanska spyrja, er tað tí, at tað hevur gingið illa við íløgunum? Nei, tað er ikki svarið.

Úrslitið av íløguvirkseminum fyri árið 2014 var 9,991 m.kr. Sammett við 2013, har var tað 7,804 m.kr. Orsøkin til, at vit ikki kunnu geva so nógv í rentu sum undanfarin ár, er tann, at tá vit settu okkara eftirlønargrunn á stovn, valdu vit at gera hann við tveimum beinum: einari kapitalpensjón og einari lívrentu. Seinni kom so tað triðja beinið – lutaeftirløn *(ratupensjónin)*.

Tað, sum tyngir okkara grunn í dag, er lívrentuparturin, tí tann parturin skal investerast 100% trygt, so har fáa vit onki avkast uttan rentu. Og ikki tykkum at siga; rentan hesa síðstu tíðina er so gott sum null, og í summun førum niðan fyri null, t.v.s., at man má gjalda fyri at hava peningin standandi, og tá eingin renta verður tilskrivað, so mugu vit seta pening av til lívrentuna. Tað er eitt krav, sum vit fáa frá Tryggingareftirlitinum. Henda peningin kunnu vit bert fáa við at taka hann av okkara avkasti, ella lána hann.



**Vit kunnu taka nøkur dømir:**

- Í 2011 kostaði hetta okkum 8,3 mió. kr.
- Í 2012 kostaði hetta okkum 3,4 mió. kr.
- Í 2013 var tað eitt plus á 3,0 mió. kr.
- Avsetingin til samhaldsfasta eftirløn í 2014 er 11,231 mió. kr.

Um vit hyggja trý ár aftur í tíðina, har rentan hevur verið lækkandi, so hevur hetta kostað okkum til samans 19,931 m. kr. Alt hetta er fíggjað av avkasti. Eingin króna er lánt. Serliga virðisjavningarnar hava verið hægri í 2014 enn í 2013.

Eg veit, at hetta er eitt sindur teknist og heldur torført at skilja, men tá vit fara at hyggja eftir rokniskapinum, kunnu vit greiða eitt sindur betur frá hesum.

Lat meg tó beinan vegin siga, at allur hesin peningur er ikki mistur, men settur sum trygd, so leingi sum rentan er so lág, sum hon er. Tá rentan byrjar at hækka, verður hesin peningur fluttur okkum aftur, og tá verður hann nýttur til rentitilskrivingar.

Eg eri sera fegin um, at vit hava klárað at fíggjað alt hetta sjálvi av okkara avkasti, og at ongin króna er lánt.

## Ábyrgdarlán

Í sambandi við stovnan av Eftirlønargrunninum, veitti Havnar Handverkarafelag grunninum eitt ábyrgdarlán upp á 5 mió. kr. Sambært avtalu millum Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags, dagfest hin 9. februar 2000.

Sambært hesi avtalu skal í seinasta lagi hin 31. desember 2015 vera gjørd ein avtala um, hvørt ábyrgdarlánið skal afturgjaldast, og um hvussu lánið eventuelt skal forrentast og afturgjaldast. Lat meg so eisini nevna í hesum sambandi, at tær 5 mió. kr. kunnu verða goldnar aftur í morgin, uttan at tað ávirkar grunnin á nakran hátt

## Kapping um eftirlønir

Sum  flestu kunnugt, so eru fleiri aktørar, ið fegnir vilja hava fatur á okkara pengum. Betri



Pensjón er eftir hondini ein stórur aktørur í Føroyum, og teir smæða seg ikki burtur; teir siga alment, at teir vilja verða ein av teimum størstu veitarunum í Føroyum. Man má leggja sær í geyma, at tað er ikki hvør sum helst, sum her bjóðar seg fram: Tað er Tryggingarfelagið Føroyar – risin í okkara fíggjarheimi.

Vit hava verið í dialogi við Betri Pensjón uttan, at teir tó hava kunnað bjóða okkum nakað, sum er betur enn tað, ið vit longu hava. Vit hava eisini tosað nakrar ferðir við Tryggingarfelagið LÍV um tað sama, men ein sannroynd er, at tá tað kemur til kostnaðin, tá skiljast okkara vegir, tí teir eru snøgt sagt ikki kappingarførir, tá talan er um umsitingarkostna fyri eftirlønir.

Og hóast okkara Eftirlønargrunnur er nógvar ferðir minni, og vit ikki hava Landskassan sum trygd, so er okkara grunnur nógvar ferðir sterkari enn LÍV.

Eik Banki hevur eisini eina skipan, har teir kunnu taka ímóti eftirlønum, men teir kunnu bert umsita tær, so leingi tú ert á arbeismarknaðum. Tá teir so skulu byrja at gjalda út, so mugu teir gera eina avtalu við ein ella annan eftirlønargrunn, sum kann gjalda eftir-



lønirnar út aftur. Hvat tað so hevur kostað brúkarunum, siga teir einki um. Eg havi ein mistanka um, at teir vita tað ikki.

Bank Nordik bjóðar sær eisini at umsita eftirlønir fyri bæði grunnar og privat fólk, og teir eru heldur ikki smædnir. Teir hava breitt seg út við, at tað kostar einki at hava sína eftirløn hjá teimum. Tað sum skelkar mest er, at tað eru fólk, sum trúgva teimum, og man stendur eftir við eini kenslu av, at antin eru hesi fólk fantastiska góðtrúgvin, ella eru tey snøgt sagt eitt sindur tollut. Lat okkum taka eitt dømi her:

Um tú gevur einum barni eina vøggugávu, lat okkum siga 500 kr.

Tá barnið er 4 ára gamalt, kemur eitt bræv frá bankanum, sum sigur tær, at nú er kontoin 0 kr., og um tú framhaldandi skal hava kontuna, so má tú gjalda góðar 100 kr. um árið annars verður kontan strikað. Hetta er ein konta, sum ongar flytingar hevur – hvørki inn- ella útgjald.

So roynir bankin at billa okkum inn, at ein eftirlønarkonto onki skal kosta. Eg veit bara eitt; á eini slíkari konto eru nógvar flytingar. Eg havi bara eitt at siga til hetta: „Bank



Nordik far til onkran annan og fortel hasa skrønuna“.

## Pensjónsreformur

Aftur í ár siga okkara fólkavaldu, at teir fara at broyta pensjónsreformin og, at teir hava samtykt millum annað, at hvør einasti lønmóttakari skal gjalda inn í ein góðkendan eftirlønargrunn. Vit eiga tann besta grunnin, meta vit. Lat tað verða sagt her, at vit frá mongum síðum hava fingið at vita, at vit eiga ein tann besta eftirlønargrunnin á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Tað kunnu vit vera fegin um og stolt av. Raksturin av einum eftirlønargrunni kann neyvan vera betur enn okkara. Snøgt sagt tí, at umsitingin er so effektiv, at vit kunnu halda hana á 5,5% av inngjøldunum.

## Krøv

Tryggingareftirlitið setur sera strong krøv til okkum, sum sita í nevndini í eftirlønargrunninum. Vit skulu fylgja eini rúgvi av krøvum og fyriskipanum, sum teir áseta.

Millum annað eru krøv um, at nevndarlimir skulu evaluerast, um teir eru førir fyri at sita í nevndini. Lat meg beinan vegin siga, at tað meinar Tryggingareftirlitið slett ikki, tí vit eru bara handverkarar.

Eg veit ikki, hvat teir meina við, tí tað eru ikki handverkarar ella fólk við lægri útbúgvingum, sum hava koyrt bæði bankar, grunnar og eisini landið á heysin, men hetta vóru fólk við hægri útbúgvingum – teir sokallaðu akademikararnir – sum kláraðu tað púra sjálvir.

Eitt av krøvinum, sum kom í fjør var, at allir nevndarlimir skuldu evaluerast. Tað merkti, at vit skuldu senda Tryggingareftirlitinum upplýsingar um hvørjar útbúgvingar og hvørjar lívsroyndir vit høvdu. Og kravt varð eisini, at nevndarlimir skuldu hava reina straffiatest o.s.f. Tryggingareftirlitið hevur eisini boðað frá, at teir fara at kanna um upplýsingarnar, sum vit hava sent teimum, eru rættir og, at teir koma á eftirlitisvitjan her hjá okkum og, at vit møguliga skulu til prývtøku hjá Tryggingareftirlitinum: livst so spyrst.

## Aktuarur v.m.

Eitt annað – heldur rímiligari krav – sum Tryggingareftirlitið setir, um vit skulu virka sum eftirlønargrunnur er, at vit skulu hava ein aktuar knýttan at grunninum. Vit hava ikki ein aktuar í føstum starvi. Hetta hevði verið alt ov kostnaðarmikið, men vit keypa okkum tær tænastur, sum kravdar verða til eina og hvørja tíð.

Tryggingareftirlitið hyggur eisini neyvt eftir váganum hjá okkum.

Grannskoðarin fer eisini ígjøgnum gongdina í grunninum.



Og so er tað aktuarurin, sum fleiri ferðir um árið gjøgnumgongur tølini og metir um okkara váðar. So eitt er vist, at efturlit manglar okkum ikki, og tað bæði nógv og dýrt.

Viðvíkjandi trygdini kann eg eisini nevna, at vit hava fingið váttan frá Datuefturlitinum og grannskoðaranum um, at okkara skipanir eru góðkendar, og tryggar.

## Ábyrgd

Lat meg her nevna, at tað er umráðandi, at limirnir sjálvir ansa eftir, at allar útgjaldingar eru sum ásettar í sáttmálanum.

Her hugsi eg um; at kanna eftir, um arbeiðsgevarin flytur tað, hann sambært sáttmálan eigur at flyta, eisini at eftirlønin verður flutt til Eftirlønargrunnin.

Sjálvandi kanna skrivstovufólk okkara tað, sum tey kunnu kanna, men har kann okkurt fara framvið uttan, at tey fanga tað. Vit eiga ikki at gloyma, at eftirlønin nú er vorðin stórur partur av lønini, og at hetta eisini er limanna ábyrgd.

Til seinast vil eg nýta høvið til at takka nevnd, stjórn og starvsfólkum fyri eitt sera gott samstarv í farna ári.





Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
SLÆTTANESGØTA 9 · 110 TÓRSHAVN · TEL. 31 99 92 / 21 99 92 · TMV@OLIVANT.FO

# SAMANDRÁTTUR AV ÁRSFRÁSØGN 2014

## Rakstarroknskapur

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Eftirlønargjøld, netto | 24.044.341 | 22.558.347 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 5.920.845 | 6.633.313 |
| Virðisjavningar | 4.496.233 | 1.556.832 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi | -426.214 | -385.746 |
| **Úrslit av íløguvirksemi til samans** | **9.990.864** | **7.804.399** |
| Útgoldnar veitingar | -3.685.313 | -2.874.449 |
| Broyting í eftirlønaravsetingum | -11.230.837 | 3.090.991 |
| **Útgoldnar veitinga og broytingar í avsetingum til samans** | **-14.916.150** | **216.542** |
| Fyrisitingarkostnaður | -1.616.123 | -1.481.052 |
| Flutt úrslit av íløguvirksemi | -8.351.363 | -6.248.982 |
| **Tryggingartekniskt úrslit** | **9.151.569** | **22.849.254** |
| Íløguúrslit av eginognini | 8.351.363 | 6.248.982 |
| Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | 17.502.932 | 29.098.236 |

## Fíggjarstøða hin 31. desember 2014

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| **Fíggjarligar íløguognir** | | |
| Aðrar fíggjarligar íløguognir til samans | 260.696.320 | 228.937.624 |
| **Fíggjaríløgur til samans** | 260.696.320 | 228.937.624 |
| **Ogn í umferð** | | |
| **Tøkur peningur** | 5.658.995 | 8.132.193 |
| **Ogn í umferð til samans** | 5.658.995 | 8.132.193 |
| **OGN TIL SAMANS** | 266.355.315 | 237.069.817 |
| **SKYLDUR** | | |
| **Eginogn til samans** | 6.163.257 | 11.584.603 |
| **Ábyrgdarlán** | 5.000.000 | 5.000.000 |
| Limakontur | 202.879.035 | 179.954.755 |
| Eftirlønaravsetingar, solidariskar | 49.812.337 | 38.581.500 |
| Onnur skuld | 2.500.686 | 1.948.958 |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | 266.355.315 | 237.069.817 |




## Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.

**Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.**

Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

**Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.**





TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón